

*Tónleikararnir í Take That fara á eina konsertferð í Bretlandi í 11 dagar í apríl og mai mánaði*

# YOUNG VIL VIÐ Í TAKE THAT



*Will Young vil fegin taka við eftir Robbie Williams í Take That*

Bretskir fjølmiðlar vilja nú verða við, at sangarin Will Young hevur boðið sær til at koma upp í poppbólkinTake That fyri Robbie Williams, sum einki vil hava við sín gamla dreingjabólk at gera.

Take That ætlar sær á eina nýggja konsertferð, og tað verður uttan Robbie Williams, sum hevur ovmikið at gera við sínari egnu yrkisleið. Tí hevur Will Young bjóða seg fram.

– Eg hevði við gleði verið ein partur av Take That og tikið við eftir Robbie Williams, sigur Will Young.

Ein talsmaður fyri Take That hevur svarað kurteisliga aftur, at Take That áður hevur spælt uttan Robbie Williams, og at hetta eisini er ætlanin á konsertferðini í ár. Hann sigur tó, at bólkurin kanska fær høvi at arbeiða saman við Will Young einaferð í framtíðini.

Take That fer á eina styttri konsertferð í apríl mánaðir. Fyrsta konsertin verður í Newcastle tann 24. apríl, og 11 dagar seinni verður tann seinasta konsertin – helst uttan Will Young.

## VANDU Í KOLAMINU



(Mynd: Scanpix)

Tað var ein heldur óvanliga venjing á skránni hjá týska felagnum Schalke 04 í farnu viku. Spælararnir fóru inn í eina kolaminu í Gelsenkirchen, og teir vóru 1200 metrar inni í minuni til eina venjing. Lagið tóktist vera gott á spælarunum, hóast teir vóru sendir inn í kolaminuna. Um vikuskiftið byrjar týska fótbóltskappingin aftur eftir vetrarsteðgin, og so er spurningurin, um Schalke 04 hevur fyrireikað seg betur enn hini feløgini til dystirnar.

## FILMUR UM LENNON-DRÁP



(Mynd: Scanpix)

Í hesum døgum verða upptøkur gjørdar í New York til nýggja filmin um drápið á enska tónleikaran John Lennon. Filmurin kallast Chapter 27, og í farnu viku vóru upptøkur gjørdar við drápsmanninum Mark David Chapman, sum í filminum verður spældur av Jered Leto. Upptøkur verða gjørdar kring Central Park og við Dakota-bygningin, har drápið varð framt.

## SPICE GIRLS HITTUST



(Mynd: Scanpix)

Tað er ikki heilt vátt í reiðrinum hjá teimum fyrrverandi Spice Girls songkvinnunum. Myndamenn tóku í síðstu viku myndir av Victoriu Beckham og Geri Halliwell, sum høvdu verið og fingið sær ein bita á eini matstovu í Los Angeles í USA. Spice Girls vóru tað stóra navnið í bretskum popptónleiki eitt skifti í 90'unum, men tær hava ikki famført saman í nógv ár.




BIG KING XXL
Stórt, skjótt og gott...
BURGER KING